# HVØR SLØKTI LJÓSIÐ?

**Maskinmeistararnir og SEV gjørdu eina semju í fjør. Kortini fór ljósið. Hví?**

Øll hava rætt til at samráðast um sína løn. Til at sita við sama borð, leggja síni ynski fram, finna eina semju. Men maskinmeistararnir hjá SEV sleppa ikki at brúka henda rættin. Ein triði partur hevur forrætt til at meta um okkara semjur. Landsstýrismaðurin hevur fingið heimild at kolldøma úrslitið av okkara samráðingum við arbeiðsgevara okkara.

So – hvør sløkti ljósið? Ikki teir samdu partarnir við borðið.

Vit eru farnir undir nýggjar samráðingar við SEV. Vit fara at brúka okkara samráðingarrætt. Hesaferð vóna vit, at allir partar, sum hava atgongd til stóru kontaktina, sessast við borðið. Okkum dámar ikki myrkur. Og okkum dámar ikki skuggaspælarar.



Vit vildu fegnir sæð landsstýrismannin í fíggjarmálum við samráðingarborðið. Vit hava sett ein stól av til tín, Bárður …

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

REPROZ